# Meirnýtsla verður als ik

**- Vit mugu sláa rimmarfast, at meirnýtsla verður ikki góðtikin og neyv fíggjarstýring skal krevjast av øllum stjórum og stovnsleiðarum, segði Høgni Hoydal millum annað í formansfrágreiðing síni á flokstingi Tjóðveldis við Gjógv leygardagin**



*Eini 80 fólk høvdu leitað sær norður til Gjáar til floksgintið hjá Tjóðveldi leygardagin*

FLOKSTING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*myndir: Leo Poulsen*

Tjóðveldi hevði árliga flokstingið um vikuskiftið. Hesaferð var tingið sett við Gjógv, sum er gomul tjóðveldisbygd. Hetta nam formaðurin, Høgni Hoydal, eisini við í formansfrágreiðing síni. Hann sigur:

»At súgva sær mátt úr bókum og námi, hevur verið hávirt, og framúr lærarar hava lagt grundina í bygdaskúlunum og eggjað til víðari lestur og sjónarring. Og tey, ið hava verið øðrvísi og hava søkt øðrvísi leiðir í útbúgving, arbeiði og lívshátti, hava verið vird og ikki háað ella spottað av bygdafólkinum.

Ongin ivi er um, at hetta er ein meginorsøk til at so mong hugsjónarfólk, undangongufólk og mentafólk eru sprottin higani. At fólk hava leitað út, og hava leitað heimaftur við nýggjum íblástri. At fólk onga andsøgn hava sæð í at virða og menna sín egna mentanararv í støðugum samskifti við heimsins krøv og møguleikar.«

Høgni Hoydal nam eisini við altjóðagerðina:

»Vit mugu síggja allan heimin sum okkara leikpall og eisini okkara ábyrgd. Vit mennast ikki sum fólk og skapa nútímans menningarmøguleikar fyri okkara komandi ættarlið uttan so, at vit eru í beinleiðis samskifti við heimsins krøv og avbjóðingar.

Frælsi er ikki ein spurningur um frælsi frá krøvum og trupulleikum. Men ein spurningur um frælsi til at taka lut og taka ábyrgd. Eisini har tað kostar mistøk, stríð og pengar.

Altjóðagerð er mest brúkta og flusnaða hugtakið í dag. Hon er ein veruleiki, men tað merkir ikki, at heimurin er grundleggjandi broyttur til tað betra.

Altjóðagerð er í grundini spurningur um nýggjar samskiftismøguleikar, nýggjar flutningsmøguleikar, nýggjar møguleikar at vinna og tapa. Fyri lond, fólk, vinnu og mentanir. Har tíð og rúmd og sambond eru broytt og skapa møguleikar til nýggjar samansetingar.«

## Prógvað tað øvugta

Høgni Hoydal vísti á, at flokkurin hevur prógvað, at hann megnar at standa saman, og at hann hevur megnað at vunnið tvey val síðani seinasta flokstíng.

Sanniliga er nógv hent og mangt broytt síðani vit vesturi í Miðvági í fjør hildu seinasta regluliga flokstíng.

»Tá spáddu onnur, at Tjóðveldið fór at fara í tvíningar og ganga langt aftur, orsakað av stríðnum um broytingar í revsilógini og verju av minnilutabólkum.

Vit prógvaðu tað øvuta. Og hava síðani vunnið tvey val so dyggiliga, har vit í báðum førum gjørdust landsins størsti flokkur.

Tá koyrdu onnur okkum í bás millum hinar flokkarnar og hartaðu okkum fyri vantandi javnstøðu og kvinnuumboðan í politikki.

Vit prógvaðu tað øvuta og hava nú javna umboðan av bæði kvinnum og monnum á tingi og í stjórnini.

Til fyri fáum mánaðum síðani teknaðu onnur eina mynd av okkum sum ein flokk, ið ikki kundi samstarva við aðrar, og spáddu okkum eina oyðimarkargongd í andstøðu, meðan ABC-samgongan fór at halda fram í ókomin ár.

Vit prógvaðu tað øvuta. Vit eru nú aftur í stjórn og hava eftir mínum tykki gjørt eitt stjórnargrundarlag, sum er í fullum samsvari við okkara mál, hugsjón og valskrá. Vit hava knýtt samstarv millum flokkar, ið kunnu bróta stillstøðuna og gomlu forðingarnar í okkara politisku skipan. Og vit sita fyri málum, ið eru bulurin í at broyta og menna Føroyar til eitt frælst, sjálvbjargið og kappingarført samfelag í heiminum.

Til fyri stuttum spáddu nógv, at Tjóðveldi fór bert at vera umboðað av politikarum í miðstaðarøkinum. Vit hava nú prógvað tað øvuta, har vit hava 12 dugnalig fólk úr nærum øllum landinum, ið virka fulla tíð í landspolitikki – umframt fólkatingsumboðið.«

## Semja um nógv mál

Nýggja samgongan hevur sett sær nógv mál fyri. Hon hevur ikki fingið lættastu byrjanina, og atfinningarnar hava – sambært Høgna Hoydal – verið nógvar, bæði í fjølmiðlunum og millum fólk.

»Men hyggja vit at politisku málunum og hugsjónunum, sum hendan stjórnin hevur sett sær og byggir á, so er talan um eina nýggja kós og stórbroytingar.

Í hesi nýggju samanseting hava vit millum annað fingið semju um:

- At taka 14 mál á føroyskar hendur – harundir stórmál sum útlendingamál, persónsrætt og revsirætt.
- At minka blokkstuðulin við 117 mió. so hann fer niðurum 500 mió.
- At leggja føroysku stjórnarskipanina til fólkaatkvøðu.
- At gera fíggjarliga uppgerð við Danmark.
- At stovna føroyskt uttanríkisráð, vinna limaskap í altjóða felagsskapum og stovnum, fáa frælsa atgongd til altjóða samstarv fyri vinnu, mentan, gransking og borgarar og styrkja okkara samleika í altjóða høpi.
- At fáa skil á búskaparstýringina, stovna búskapargrunn og skipa ein sjálvberandi búskap
- At gera miðvísar íløgur í útbúgving og gransking og skúlaskap.
- At gera vinnuframaskipanir
- At broyta tilfeingisumsitingina og skipa fiskidagamarknað til tess at fáa javna kapping.
- At styrkja okkara samleika við miðvísum mentanarpolitikki (sum ikki er avbyrgjandi og nalvaskoðandi, soleiðis sum tað annars varð lagt út í pressuni).
- At fara málrættað eftir at geva veikastu samfelagsborgarunum javnbjóðis rættindi og møguleikar til eitt virkið og virðiligt lív.
- At smalka gjónna millum samfelagsbólkarnar við samhaldsføstumskattapolitikki og sosialpolitikki
- At styrkja rættartrygd og javnstøðu í samfelagnum.
- At fremja verulig tiltøk innan umhvørvi, orku og tilfeingisumsiting, sum krevja dyggar broytingar í framtíðini.
- At broyta kommunala bygnaðin so kommunurnar gerast størri og kunnu kappst í rímiligari javnvág um at bjóða sínum borgarum nútímans kor – og harundir at gera eina útjavningarskipan

Hetta eru alt hjartamál hjá Tjóðveldi og í fullum samsvari við okkara valskrá, stevnu og stevnumið.«

## Strammur fíggjarpolitikkur

Eitt, sum formaður Tjóðveldis legði stóran dent á, er at førdur verður ein strammur fíggjarpolitikkur komandi árini.

»Størsta avbjóðingin beint í løtuni er at fáa skil á fíggjar- og búskaparpolitikkinum, og beinanvegin at seta kósina til broytingar og nýskapan í politisku raðfestingunum.

Men tað krevur nógv av okkum. Vit mugu ikki gykla nøkrum fyri, at vit eru komin til nakað búgvið borð.

Tørvur er beinanvegin á at fáa skil á almenna fíggjarpolitikkin, orsakað av gongdini seinastu árini og at tálma framskrivaða og ótálmaða rakstrarkostnaðin til tess at gera nýggjar raðfestingar.

Vit mugu sláa rimmarfast, at meirnýtsla verður ikki góðtikin og neyv fíggjarstýring skal krevjast av øllum stjórum og stovnsleiðarum.

Neyðugt verður at fara undir nøkur verulig bygnaðarlig tiltøk til tess at skapa búskaparvøkstur frameftir. Har mugu vit tora at viðgera